# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Minningarorð um Sofus í Selvindi

Nú Sofus er farin leita tankarnir aftur í takksemi yvir at hava kent hendan merkismann. Tað var sum reiðari at vit komu at kenna Sofus, við tað at Ingolf sigldi við Kambi. Tað eru slíkir vinnulívsmenn við tí hugburði, sum Sofus hevði, sum hava ment og ríkað okkara samfelag.

At verða heiðurligur, reiðiligur og at gjalda hvørjum sítt, vóru dygdir hann legði seg eftir. Hetta eru lyndiseyðkenni, ið ikki kunnu metast nóg høgt. Eg trúgvi hesar dygdir eru førningur, hann hevur ført víðari frá abbabeiggjunum, sum eisini høvdu reiðaravirksemi. Trúfesti og livandi áhugi eyðkendu eisini Sofus. Sjálvt um tað eru fleiri ár síðani vit høvdu vinnuligt samband við Sofus, hevur samskifti verið hildið við líka alla tíðina. Eg og Sofus funnu eina ávísa frægd í at verða ósamd um ymisk lívsins viðurskifti. Við hansara argandi lyndi høvdu vit mangar stuttligar samrøður. Sofus var gávumildur sum fáur, men hann vildi verða tað í loyndum; sum tað stendur, lat ikki vinstru hond tína vita hvat høgra



hond tín ger.

Seinast eg tosaði við Sofus tosaði hann um, at tá lívsins stormar herja, hava pengar so ómetaliga lítlan týdning. Tá liggja virðini á einum hægri stað. Vit gleddust eisini saman um, at eftir svára sorg, var áræðið og gleðin yvir lívið byrja at rakna við aftur.

Sóley, Lis og Sólva, fyri tykkum má tað kennast ómetaliga svárt, at bert eftir 10 mánum hava bæði móðir og faðir hendur slept. Hesar hendur, sum frá fyrsta degi av hava vart og fjálga tykkara lív. Tá eru lyftini góð um hendur, sum ikki sleppa í Heb. 13,5: »Eg skal als ikki sleppa tær og á ongum sinni fara frá tær.« Jesus styrki tykkum við familjum. Eisini mammuna og systrarnar við familjum; Rósing og Niels Jacob við familjum og øllum, sum varða av.

Heilsan við áskriftini á blaðnum til jarðarferðina, 1. Pætursbræv 5,7: »Kastið alla sorg tykkara á Hann, tí at Hann hevur umsorgan fyri tykkum.«

**Sólfríð og Ingolf**

## †

## Andlát og jarðarferðir

**Mortan Petersen av Hvítanesi á Tvøroyri**, andaðist leygardagin 81 ára gamal. Kistan fer úr kappelinum á Tvøroyrar sjúkrahúsi í kvøld klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Tvøroyrar kirkju mikudagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Mortan, kunnu lata Eldrasambýlinum við Sýlánna eina peningagávu. Konta í Føroya Banka.

**Símun Leo Einarsson** ættaður úr Rituvík búsitandi í Lamba, andaðist sunnudagin 52 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Glyvrar Kirkju fríggjadagin kl. 14.

**Dánjal Petur Hansen, av Nesi**, vanliga nevndur Petur, andaðist á Eysturoyar Røktar -og Ellisheimi leygardagin, 81 ára gamal. Kistan fer av Røktarheiminum í Runavík týskvøldið kl. 18. Jarðarferðin verður úr Fríðrikskirkjuni mikudagin kl. 14. Tey, ið vilja minnast Petur, kunnu lata Parkinsonfelagnum eina peningagávu. Konta í Føroya Banka

## Føðingardagur

Í dag, týsdagin 9. oktober, fyllir Pól Dánjal Poulsen, bussførari á Strondum, 50 ár. Opið hús verður heima á Rættartrøðni frá kl. 18, har øll eru vælkomin.



MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu tá góða mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Magdalena Olsen**
á Válinum

andaðist og varð jarðað.
Takk til starvsfólk og búðfólk á sambýlinum í Vestmanna.
Takk fyri vakran sang og andakt, tá komi varð í kirkjuna.
Takk til Marjun Bæk prest, Magna Cristiansen fyri vakran sang, kirkjutænarar, sangarar, berarar, gravarar og øllum tykkum sum hjálptu til við jarðarferðina. Takk fyri blómur, kransar og peningargávur til missiónshúsið og kirkjuna, og tykkum, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Marin, Dinna, Magnina, Hanna, Iva, Vilhelm Magnus, Elsa og Kári**

## †

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at mín elskaði maður og kæri pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Dánjal Petur Hansen**
*vanliga nevndur Petur á stykkinum*
av Nesi

andaðist á Eysturoyar røktar- og ellisheimi 6. oktobur, 81 ára gamal.
Jarðarferðin verður úr Fríðrikskirkjuni mikudagin kl. 14.

*Vegna familjuna*
**Mary**
**Elsa, Margretha, Hans Terji, Andrias**
**Alberg, Magnus, Dagmar og Eyðbjørg**

**Dagurin**
**10. oktober. Gereon**, deyður umleið ár 300. Eftir halgisøguni kristin herhøvdingi, sum varð tikin av døgum.



Lesið Sosialin so eru tit við